Álit

í

løgtingsmáli nr. 56/2025: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um veiðigjøld fyri fiskiskap (Veiðigjaldslógin) (Striking av áseting um lægri veiðigjald, tá ið tøka kvotan minkar serliga nógv)

Landsstýriskvinnan í fíggjarmálum, Ruth Vang, hevur lagt málið fram 2. desember 2025, og eftir 1. viðgerð 4. desember 2025 er tað beint Fíggjarnevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi 9. og 10. desember 2025.

Undir viðgerðini hevur nevndin havt fund við Felagið Nótaskip, Føroya Fiskimannafelag, Føroya Reiðarafelag og landsstýriskvinnuna í fíggjarmálum, Ruth Vang.

Undir viðgerðini hevur nevndin býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Eyðgunn Samuelsen, Bjarni Hammer, Dennis Holm og Hanna Jensen) hevur hesar viðmerkingar:

Uppskotið snýr seg um ásetingina í § 7 í veiðigjaldslógini, sum hevur reglur um, at minkar tøka kvotan serliga nógv og inntøkurnar í fiskivinnuni tí eisini minka munandi, so skal veiðigjaldið lækka við einari helvt fyri tað fiskaslagið.

Í 2025 minkaðu kvoturnar á makreli og sild munandi, eftir at Føroyar høvdu gjørt semju við hini strandarlondini um hesi fiskasløg. Serliga fyri makrelin er prísurin tó hækkaður sera nógv síðani.

Galdandi lóggáva tekur ikki hædd fyri, at hægri prísur ofta vigar upp ímóti eini lægri kvotu. Í løtuni er hetta støðan fyri makrelin. Eftir semjuna um makrelin er prísurin á makreli trífaldaður, og semjan ger eisini, at fiskast kann meira effektivt enn áður.

Uppskotið snýr seg um at strika verandi áseting í § 7 um lægri veiðigjald, tá ið kvoturnar minka serliga nógv. Hendan ásetingin kann hava ta ótilætlaðu avleiðing, at veiðigjaldið lækkar, hóast inntøkan hjá vinnuni ikki minkar, tí hægri prísur vigar upp ímóti eini lægri kvotu.

Undir hoyringunum er komið fram, at tað ikki er semja millum umboðini fyri reiðararnar og Fíggjarmálaráðið um, hvussu § 7 skal tulkast, og hvørjar avleiðingarnar verða av at strika greinina.

Umboð fyri reiðararnar hava víst á, at teir meta, at ein avtala er gjørd millum landsstýrið og reiðararnar í 2020 um, hvussu veiðigjøldini skulu vera, og at ásetingin um lægri kvotur og lægri

tilfeingisgjald var partur av avtaluni. Eins og meirilutin í Fíggjarnevndini hevur víst á fyrr, so var hendan argumentatiónin um avtalur um gjøld ikki førd fram, tá veiðigjøldini vórðu tillagaði í 2023.

Umboð fyri reiðararnar vístu í hoyringini á, at kvoturnar væntandi fara at minka so nógv, at tað ikki verður væntað, at tað fer at javnviga við høgum makrelprísi. Hinvegin ásannaðu umboð fyri reiðararnar, at makrelprísurin í ár hevur verið væl hægri, enn tað sum teir mettu frammanundan. Umboð fyri reiðararnar ásanna eisini, at tað eru fleiri viðurskifti, sum ávirka hetta, bæði minkandi makrelkvotur og avtalan um makrelin, sum ger, at makrelur kann fiskast í bretskum sjógvi.

Fíggjarmálaráðið hevur undir hoyringini víst á, at makrelprísurin eisini var hækkaður nógv í november og desember í mun til miðalprísin fyrstu 10 mánaðirnar í ár. Fíggjarmálaráðið metti eisini, at tað ikki var ósannlíkt, at prísurin fór at hækka enn meiri, tí kvoturnar væntandi fara at minka komandi ár.

Umboð fyri reiðararnar vístu undir hoyringini á, at teir mettu, at veiðigjøldini fóru at verða ov høg fyri vinnuna komandi ár, um § 7 verður strikað. Fíggjarmálaráðið vísti hinvegin á, at tað ikki vóru nakrir ábendingar um, at veiðigjøldini eru ov høg fyri vinnuna.

Í viðgerðini í nevndini hevur ávirkanin á skip, sum hava lítla kvotu, eisini verið umrødd, og heitir meirilutin á landstýriskvinnuna um at viðgera, um hvørt veiðugjaldið í mun til skip, ið hava lítla kvotu, kann vera minni, tó uttan at samlaða inntøkan í landskassan minkar munandi.

Við hesum viðmerkingum tekur meirilutin undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

Minnilutin (Beinir Johannesen, Magnus Rasmussen og Steffan Klein Poulsen) hevur hesar viðmerkingar:

Uppskotið leggur upp til at strika § 7 í veiðigjaldslógini, soleiðis at onki fiskaslag verður fevnt av ásetingini um helvtargjald longur.

Galdandi áseting hevur til endamáls, at tá samlaða tøka kvotan fer niður um helvtina av miðal kvotuni seinastu 5 árini, lækkar veiðigjaldið niður í helvt. Hetta tí, at eitt høgt gjald kann virka serliga tyngjandi, tá lítið er at fiska.

Tá veiðigjaldslógin bleiv samtykt í 2021, var tað ein arbeiðsbólkur umboðandi myndugleikar og vinnuna, sum í semju gjørdi eitt tilmæli til politisku skipanina, har eitt av tilmælunum var, at atlit skuldi takast til sveiggjandi kvotur.

Hetta tí, at atlit var ikki tikið til annað enn prísin, ið annars ávirkar raksturin hjá reiðaríum. Undir hesum olja og renta, ið, síðan lógin er farin at virka, er dýrkað sera nógv. Tí verður nú einasta atlit, ið tekur hædd fyri broytiligum umstøðum, ið ikki er sjálvur prísurin, tikið burturúr. Hesum tekur minnilutin ikki undir við.

Tá kvoturnar minka ógvisliga, og einasti ventilur í veiðigjaldslógini, sum vigar upp ímóti slíkari minking, verður tikin úr, gongur hetta hart útyvir uppsjóvarflotan. Serliga tey smærru reiðaríini.

Tað ber longu til at staðfesta, at bæði makrelkvotan og svartkjaftakvotan fara at minka heilt munandi í 2026. Tilmælið hjá ICES ráðgevingini er at skerja makrelkvotuna við 70 prosentum. Gerst hetta veruleiki, verður tøka føroyska makrelkvotan komandi ár einans 16 prosent av miðalkvotuni í árunum 2021 til 2025.

Umframt niðurskurðin í kvotunum er ein innbygd hækking í veiðigjaldslógini, har veiðigjaldsstigin hækkar við tveimum prosentstigum í 2026, í samsvari við broytingina hjá sitandi samgongu.

Tað er eisini neyðugt at leggja afturat, at umframt stóra niðurskurðin í makrelinum, minkar svartkjaftakvotan við heili 41 prosentum komandi ár. Við umfatandi niðurskurði í bæði makreli og svartkjafti fara inntøkurnar hjá føroysku reiðaríunum, manningunum, virkjunum á landi og øllum avleiddum virksemi at minka nógv komandi ár.

Tað er merkisvert, at landsstýrið ikki hevur gjørt ítøkiligar útrokningar ella metingar í sambandi við uppskotið. Tað einasta, sum vit fáa upplýst, er, at landskassin fær eini 50-90 mió. kr. í meirinntøku við at strika § 7. Manningarnar eiga áleið 20% av hesari meirinntøku.

Í hoyringarskrivunum er útrokning gjørd, sum vísir, at um makrel kvoturnar verða skornar við 70%, so minkar netto veiðivirðið við 925 mió. kr., altso næstan einari milliard. Verða tær skornar við 48%, so minkar netto veiðivirðið við eini 725 mió. kr.

Samgongan rættvísger hesa lógarbroyting við teirri grundgeving, at hægri prísir viga upp ímóti lægri kvotum. Men tað er mark fyri, hvussu nógv prísirnir kunnu hækka, tí fyrr ella seinni, so flytur keyparin seg til aðrar vørur, so sum makrel úr Kyrrahavinum ístaðin fyri føroyska makrelin ella til heilt aðrar matvørur. Tað er tí rættiliga ósannlíkt, at prísurin áhaldandi kann mótviga lækkandi kvotum. Kvoturnar væntast jú at minka so mikið nógv, sum lýst omanfyri, at samlað sæð verður veiðivirðið allarhelst lægri.

Hetta er triðju ferð seinastu tvey árini, at skotið verður upp at gera broytingar í Veiðigjaldslógini. Minnilutin heldur, at karmarnir rundan um fiskivinnuna skulu vera støðugir, so vinnan veit, hvat hon hevur at fyrihalda seg til, har grundleggjandi broytingar ikki vera framdar við stuttum millumbilum.

Við hesum viðmerkingum tekur minnilutin ikki undir við málinum og mælir Løgtinginum frá at samtykkja uppskotið.

Fíggjarnevndin, 12. desember 2025

Eyðgunn Samuelsen forkvinna	Beinir Johannesen næstformaður	Bjarni Hammer
Dennis Holm	Hanna Jensen	Magnus Rasmussen
	Steffan Klein Poulsen	